## Spreinging á orkuverki

Minst átta fólk doyðu, og 54 eru ikki komin afturíaftur eftir eina harða spreinging á vatnorkuverkinum Sajano-Sjusjenskaja í Sibir í morgun. Leiðslan sigur, at vanlukkan hendi, tá ein oljukøldur transformatorur sprongdist. Spreingingin fekk fólk í umráðnum at stúra fyri, at byrgingin fór at skrædna, og fleiri valdu at taka til rýmingar. Myndugleikanrir hava síðani sissað fólk og sagt, at eingin vandi er fyri byrgingini. Sajano-Sjusjenskaja er tað størsta vatnorkuverkið í Russlandi, og framleiðsluorkan er 6,4 gigawatt. Millum annað fáa fleiri stál- og aluminiumsvirkir streym frá verkinum.



# Jóhan Dahl sera væl nøgdur við átøk hjá sendistovuni í London

**-Sendistovan í London ger eitt gott og týdningarmikið arbeiði, og eg ivist ikki í, at tað fer at gagna øllum pørtum, sigur Jóhan Dahl, sum eisini vitjaði føroysku sendistovuna í London, nú hann var har**

VINNUSAMSTARV
*Jan Müller/Árni Joensen:*
*jan@ras2.fo*
*arni@sosialurin.fo*

Í sambandi við fíggjarlóg og sparingar hjá tí almenna hevur verið tosað nógv um, hvar sparast kann, men stendur tað til landsstýrismannin í vinnumálum, verður sendistovan í London neyvan tað fyrsta, sum verður spart burtur. Jóhan Dahl var í hvussu er sera væl nøgdur við ta kunning, sum hann fekk frá sendimanninum, Áka Johannesen, tá landsstýrismaðurin stakk inn á gólvið á sendistovuni fyri stuttum.

-Ja, eg fekk ta fatan, at tað eru nøkur sera áhugaverd og gagnlig átøk, sum sendistovan arbeiðir við, og eg ivist ikki í, at tey fara at koma føroyskari vinnu og føroyskari mentan til gagns, sigur landsstýrismaðurin við Rás2/Sosialin.

Jóhan Dahl sigur, at tær føroysku sendistovurnar uttanlands kunnu brúkast til at lata hurðar upp fyri bæði handli, vinnu og mentan, og at tað er umráðandi, at viðkomandi ráð í landsstýrinum samstarva innanhýsis fyri at fáa sum mest burturúr. Í hesum høpi hevur tað sera stóran týdning at fáa holla kunning frá sendistovunum, so myndugleikarnir hava tann besta førleikan til at taka støðu í teimum ymsu málunum, sigur hann.

-Skal hetta tulkast, sum at eitt nú sendistovan í London verður ikki tað fyrsta, sum samgongan fer at spara burtur?

-Tað kann eg ikki siga, men eg kann staðfesta, at frágreiðingin frá sendimanninum segði, at tað eru sera týðandi átøk, sum sendistovan arbeiðir við, og sum vónandi og væntandi fara at geva úrslit fyri samfelagið, sigur Jóhan Dahl.




*Johan Dahl, landsstýrismaður uttan fyri bretska parlamentið í London við Big Ben í baksýni*
*Mynd: Jan Müller*

## Vinnumálaráðharrin vitjaði í bretska parlamentinum

Ì juni mánaði vitjaði Johan Dahl, vinnumálaráðharri og Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi í bretska parlamentinum. Har hittu teir umboð fyri Føroyanevndina, sum fevnir um tinglimir úr øllum flokkum og úr ymsum økjum í Stórabretlandi. Rás2 og Sosialurin vórðu við á hesi vitjan, sum eisini gekk til bretska olju- og orkumálaráðið og til høvuðsskrivsstovuna hjá Statoil í London.

Í blaðnum í dag eru samrøður frá ferðini, sum allar hava verið sendar á Rás2.

UTTANRÍKISRÁÐIÐ

SENDISTOVA FØROYA Í LONDON

Sendimaður: Áki Johansen

55 Sloane Street
London SW1X 9SR
United Kingdom
Telefon: +44 (0) 207 333 0207
Teldupostur: London@mfa.fo
Heimasíða: www.faroes.org.uk